UTTAN ÚR HEIMI

Einki samband við Reagan

Tann nú 92 ára gamli fyrrverandi amerikanski forsetin Ronald Reagan er nú sjúkur av Alzheimers-sjúkuni, at hann fær hvørki tosað ella gingið. Hann liggur fyri tað mesta í songini, og kemur hann fram á gólv, noyðist hann í koyristól. Hildið verður, at hann kennir ikki fólk longur, heldur ikki síni næstu.

Ronald Reagan telist millum teir best umtóktu amerikonsku forsetarnar í nýggjari tíð. Aftan á forsetaárini plagdi hann at taka lut í einum hópi av ymsum tiltøkum, men tey seinastu árini hevur hann verið so sjúkur, at konan, Nancy, vanliga hevur umboðað hann. Men hob er nú givin við hesum, og tey bæði liva eina friðarliga tilveru í Los Angeles, skrivar blaðið People.

Men Reagan er ikki gloymdur. Fyri nøkrum vikum síðani ætlaði sjónvarpsstøðin CBS at senda nakrar atfinningarsamar sendingar um forsetaskeið hansara, men eftir trýsti frá konservativum kreftum valdi støðin at taka sendingarnar av skránni.

Fer frá Røkke

Norski ríkmaðurin Kjell Inge Røkke missir nú ein av sínum næstu og týdningarmestu medarbeiðarum.

Í gjár kunngjørdi fíggjarstjórin í Aker Kværner, Trond Westlie, at hann fer úr starvinum. Blaðið Aftenposten skrivar, at Trond Westlie hevur havt ein týðandi lut í arbeiðinum at fáa fíggjarviðurskiftini hjá fyritøkuni Aker RGI í rættlag, og tað var eisini hann, sum stóð á odda fyri samráðingunum, tá tað í oktober eydnaðist Kjell Inge Røkke at fáa eina avtalu við teir, sum eiga pengar til góðar hjá ríkmanninum og feløgum hansara.

Norskir eygleiðarar undrast eitt sindur á, hví Trond Westlie fer frá nú, tí arbeiðið at endurfíggja Aker RGI verður ikki liðugt fyrr enn í fyrsta lagi næsta summar. Tá skal fyritøkan endurfíggja eitt lán, sum er 3,5 milliardir krónur. Men fíggjarstjórin, sum hevur arbeitt hjá Røkke síðani 1995, hevur ongar viðmerkingar.

Afturgongd í Danmark

Búskaparliga gongur tað ikki so væl í Danmark. Ja, sambært fjølmiðlunum gongur tað munandi verri, enn búskaparfrøðingar høvdu roknað við.

Í apríl-ársfjórðingi vísti danski búskapurin eitt fall upp á 0,5 prosent, og í juli-ársfjórðingi var fallið 0,3 prosent, vísa tøl hjá donsku hagstovuni. Orsøkin er, at danir hava útflutt minni, samstundis sum teir hava innflutt meiri. Eitt nú minkaði útflutningurin 1,3 prosent í juli-ársfjórðingi, meðan innflutningurin vaks 2,5 prosent í sama tíðarskeiðinum.

Búskaparfrøðingurin Steen Bocian, sum starvast í Danske Bank, sigur við blaðið JydskeVestkysten, at tað hevur gingið munandi verri í búskapinum, enn hann og hansara felagar høvdu væntað, og at gongdin kemur óvart á teir. Hendir eingin munagóð broyting í ársins seinasta fjórðingi, verður ársúrslitið eitt fall, sigur hann.

Noreg ikki við í herseting

Norskir politikarar eru illa við, eftir at talsmenn hjá amerikanska verjumálaráðnum Pentagon eru farnir at umrøða Noreg sum ein part av hersetingarvaldinum í Irak.

-Tað er ikki so. Norsku hermenninir í Irak skulu bert hjálpa til at veita fólkinum trygd. Tað ger tað sama, hvat amerikanskir myndugleikar siga. Eg haldi meg til veruleikan og ikki tað, sum onnur siga, segði norski verjumálaráðharrin, Kristin Krohn Devold, við tíðindastovuna NTB í gjár.

Hon heldur ikki, at tað hevur nakran týdning, hvørt tann norska herdeildin í Irak hevur hernaðarliga ella hjálparuppgávur, soleiðis sum summir norðmenn spyrja. Tað týdningarmesta er, at hermenninir eru har fyri at hjálpa sivilfólkinum, sigur Kristin Krohn Devold.

Toskastovnurin í Norðsjónum er bara ein triðingur av tí, hann eigur at vera. Tí má veiðan skerjast nógv, sigur ES-nevndin. Danskir fiskimenn mótmæla

Mynd: Reuters

Danska fiskivinnan hótt

ES-nevndin hevur lagt fram eitt uppskot um kvotur og fiskidagar, sum danska fiskivinnan als ikki kann góðtaka. Hatta ger enda á vinnuni, siga fiskimenninir

FISKIVINNU-POLITIKKUR
Árni Joensen
fartekst@mail.dl

- Fær ES-nevndin sín vilja, noyðast tveir triðingar av donsku fiskimonnunum at finna sær okkurt annað at gera.

Tað er niðurstøðan hjá donsku fiskimonnunum, eftir at ES-nevndin er komin við enn einum uppskoti um, hvussu fiskiskapurin í Norðsjónum, Kattegat og Skagerrak skal skipast næsta ár og frameftir.

Tað er serliga toskurin í Norðsjónum, skal skal verjast, tí hann er so illa fyri. Fiskifrøðingarnir siga, at stovnurin eigur at vera í minsta lagi 150.000 tons, men at hann er bara 52.000 tons í dag. Ætlanin er eisini at skerja veiðina eftir reyðsprøku munandi, og tað er heldur ikki fallið í góða jørð millum danskar fiskimenn.

Sum skilst ætlar ES-nevndin at skerja toskaveiðina 50 prosent, og at veiðan eftir reyðsprøku skal skerjast millum 30 og 47 prosent á teimum ymsu leiðunum.

Mariann Fischer Boel, fiskimálaráðharri, heldur, at ES-nevndin tekur í so rívan til, men hon ásannar, at okkurt munagott má gerast. Hinvegin ásannar hon eisini, at verður ætlanin hjá ES-nevndini framd í verki, verður danska fiskivinnan ikki tann, hon hevur verið.

Russiska valið hvørki frítt ella rættvíst

Í morgin er tjóðartingsval í Russlandi, men fleiri ivast í, hvussu frítt og rættvíst valið er

RUSSLAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

Fyri nøkrum døgum síðani tóku tann høgrasinnaði flokkurin Samgongan og kommunistaflokkurin seg saman at fordøma Vladimir Putin, forseta. Flokkarnir vilja vera við, at forsetin hevur gjørt tjóðartingsvalið til ein glæntrileik, og at tað hvørki verður frítt ella rættvíst.

Tað eru heldur ikki bara hesi, sum finnast at luti forsetans í sambandi við valið. Tann altjóða viðurkendi granskarin Liilja Sjevtsova sigur við Aftenposten, at Putin nýtir allar snildir, so hann kann fáa eitt tjóðarting, sum er til reiðar at fylgja boðum hansara. Hon heldur, at russiska valdsskipanin er vorðin munandi miðsavnað, síðani Putin kom framat.

Hesum tekur Michael McFaul á lærda Stanford-háskúlanum undir við. Hann sigur, at sjálvt um russiski forsetin hevur stýðjað búskaparligar nýskipanir og økt samskiftið við Vesturheimin, er hann ikki demokratur. Stýringin er miðsavnað, og tað er demokratiið, sum er við undirlutan, sigur hann.

Almennu russisku fjølmiðlarnir verða eisini lagdir undir at ganga ørindi fyri forsetan upp undir valið. Hetta hevur verið so mikið eyðsýnt, at fyri nøkrum døgum síðani mótmælti evropeiski menningar- og samstarvsfelagsskapurin OSCE framferðini hjá fjølmiðlunum.

ítróttur

Nr. 233 • leygardagur • 6. desember 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Aftur eitt brak

Stórdysturin hesaferð verður í Havn, har VÍF skal prógva, at stórsigurin á StÍF ikki var av tilvild

UPPTAKT-MENN
Jákup Mørk

Soleiðis sum hondbóltslandskappingin hjá monnum hevur lagað, so er eitt oddabrak á skránni mest sum hvørt umfar, og hetta fær ikki annað enn verið hugaligt hjá áskoðarunum, sum ivaleyst eisini verða fleiri í tali av hesi orsøk.

Hesaferð er brakið í Havn, har ársins næsta útgáva av føroyska hondbóltsklassikaranum er á skránni.

VÍF hevur annars ikki livað upp til heitið sum ein av risunum í føroyskum manshondbólti hetta kappingarárið, men í dystinum móti StÍF raknaðu teir við, og knúsandi sigurin ta ferðina gav greiðar ábendingar um, at teir kortini eru eitt lið, sum roknast skal við í ár.

Her hevur tað annars verið Kyndil, sum hevur sett dagsskránna, og verður sæð burtur frá kiksaranum móti H71, so hevur framúr stríðsviljin borið liðið á mál at kalla hvørja ferð.

Og stríðsviljanum verður eisini brúk fyri sunnudagin móti VÍF. Hóast talan tá var átøk eini kreppu hjá VÍF, so stóð heilt nógv á Kyndli í dystinum Vestmanna, har liðið í allar evstu løtu slapp úr saksinum. Koyrir spælið hjá VÍF eins væl nú, sum tað gjørdi seinasta sunnudag, so skal helst enn meira til hjá Kyndli, men higartil hava teir so eisini víst seg at spæla proportionalt við uppgávuna.

Hugnakvøld

Í hinum báðum dystunum um vikuskiftið er lítið at ivast í, at ávíkavist StÍF og Neistin fáa leypin fullan.

StÍF skal á heimavølli dystast móti H71, og hóast hoyvíkingarnir oftast stríðast væl, so er tað í sjálvum sær neyvan nóg mikið móti StÍF.

Kollfirðingar tykjast vera púrasta fyri ongum í løtuni. Ikki minst vegna saknin av Damir Oros og Regin Petersen, og verður avrikið ikki bøtt munandi í mun til tær báðar seinastu ferðirnar, so verður talan nærum um hugnakvøld hjá neistamonnunum, sum tó munnu vara seg við at taka nakað fyri givið móti KÍF. Í øllum førum munnu viðhaldsfólkini ikki hava gloymt uppgerðina við triðjudeildarliðið hjá kollfirðingunum fyri júst einum ári síðani.

Eftir avrikið hjá VÍF fyri viku síðani, tykist stórdysturin móti Kyndli vera fullkomuliga opin, og lítið er at ivast í, at talan verður um fullsetta ítróttarhøll uppi á Hálsi

Neistin vil upp í part

VB og VÍF eru stórfavorittar, men í Havn kann Stjørnan rokna við harðari mótstøðu frá Neistanum

UPPTAKT-KVINNUR
Jákup Mørk

Sum vant, so eru tríggir dystir á skránni í bestu kvinnudeildini um vikuskiftið. Ein av hesum verður leiktur leygardagin, og hetta tykist eisini vera tann dysturin, har størstur spenningur er um úrslitið.

Neistin hevur seinastu vikurnar roynt at ota seg alt nærri oddinum, og nú hava tær møguleikan at koma heilt nær. Vinna tær dystin á Stjørnuni, so eru bert tvey stig upp til silvurplássið, og so eru brádliga fýra lið, sum fara at liggja heilt jøvn, tá farið verður undir endaspælið.

Í fyrra dystinum millum liðini bæði var um reppið, at Neistin megnaði at venda dystinum í Klaksvík, og tí halda tær bláu neyvan, at tað er heilt óhugsandi, at tað skal rigga hjá teimum hesaferð. Hinvegin vita tær eisini av, at Stjørnan í løtuni er sera væl fyri. Hetta varð kanska best undirstrika seinasta vikuskifti, tá tær vunnu í Vestmanna, og so er spurningurin, hvørt tær nú megna at minkað heiðursmerkjabiðlarnar niður í tríggjar.

Tveir favorittar

Hinir báðir dystirnir í deildini skulu leikast sunnudagin, og í báðum førunum er talan um greiðar favorittar. VB skal á útivølli royna seg móti StÍF, og einki er at ivast í, at VB her hevur nakað at prógva. Talan var nevnliga um eitt VB-lið uttan útlendingar, sum fyrr í heyst tapti heimadystin fyri StÍF, og tann fortreytin er í øllum førum broytt. Og eftir uppvísingina í Vestmanna hóskvøldið, so er VB helst favorittur óansæð, hvat mótstøðuliðið talan er um.

Seinasti dysturin er í Havn, har VÍF nú skal royna at reisa seg. Fríða Marjunardóttir er ikki við hesaferð, tá hon í frustratión eftir dystin móti VB megnaði at brúka seg til reytt kort, men kanska er tað bara eini fyrimunur fyri VÍF. Tað merkir í øllum førum, at Fríða fær frið at koma seg heilt yvir skaðan, sum hon hevur drigist við seinastu vikurnar, og undir øllum umstøðum eigur VÍF kortini at vera nóg sterkt til at vinna á einum Kyndils liðið, sum í ár hevur leiklutin at stríðast undan niðurflytingini.